| Útbúgvingarprofilur |
| --- |
| Lýsing av útbúgving<br>Bachelor í Sosialvísindum og samfelagsplanlegging<br>*Bachelor of Social Science (B.S.Sc.) in Social Science and Planning* |

| | |
| --- | --- |
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Samfelagsvísindalig bachelorútbúgving, 3 ár (180 ECTS). |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og Samfelagsdeildin<br>University of the Faroe Islands, Department of History and Social Sciences |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Útbúgvingin byrjað á heysti 2012, og heldur fram til onnur avgerð verður tikin. |
| STIG | Bachelor of Social Science, “1st Cycle”, sambært EQF - LLL og QF – EHEA. |

| A | **ENDAMÁL** |
| --- | --- |
| | Endamálið við útbúgvingini er at geva lesandi førleika til at arbeiða sjálvstøðugt og tvørvísindaliga við sosialvísindaligum og planleggingarrættaðum uppgávum í samfelagnum. Útbúgvingin gevur førleika til at útinna, miðla og leiða arbeiðsuppgávur og -verkætlanir, ið burðardygga menning og framtíðartrygging modernaða samfelagsins er treytað av. Gevur førleika til at samstarva við samfelagsgranskarar, privatar og almennar stovnar, sjálvbodnar felagsskapir og aðrar fakbólkar. Haraftrat, førleika til at lýsa mál úr fleiri sjónarhornum, til at savna saman og greina vitan og heimildir, og at miðla vitan og úrslit við støði í sosialvísindaligum og planleggingarrættaðum spurningum og trupulleikum. |

| B | **EYÐKENNI** | |
| --- | --- | --- |
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Evnisøkini eru sosialvísindi og samfelagsplanlegging. Høvuðsdentur er á samfelagsvísindaligu høvuðsøkini sosiologi, stjónmálafrøði og antropologi, har serliga spurningar um vælferð og fólkaræði, og um mentanarligar og sosialar broytingar, eru á breddanum. Samfelagsplanlegging fevnir um tey sjónarhorn og tær tilgongdir (prosessir), sum stuðla undir tilætlaða samfelagsliga menning, grundað á felags virði, ætlanir og avgerðir. |
| 2 | ALMENNUR DENTUR | Áherðsla verður løgd á at arbeiða tvørvísindaliga við støði í trupulleika-grundaðari (PBL) læring. Kritisk reflekterandi støðutakan skal leiða arbeiðsgongdina í útbúgvingini. |
| 3 | KÓS | Akademisk útbúgving, sum hevur ein serligan praksis- og granskingargrundaðan profil. Útbúgving við áherðslu á sínámillum ávirkan millum sosiala praksis og vísindalig ástøði og háttaløg. Trupulleika-grundað (PBL) verkætlanararbeiði týðandi táttur í útbúgvingini. |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Útbúgvingin umfatar tvey ár við skeiðum, sum í stóran mun eru felags fyri bachelorútbúgvingarnar í (a) Sosialvísindum og samfelagsplanlegging, (b) Politikki |

| | | |
|---|---|---|
| | | og umsiting og (c) Søgu. Triðja árið er ikki felags. Fakliga innihaldið í útbúgvinginini er grundað á vitan úr sosialvísindaligari og planleggingarfakligari gransking. |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Lokin bachelorútbúgving gevur rættin at nýta heitið Bachelor í samfelagsvísindum (Bachelor of Social Science) (BSSc). Størv innan almenna og privata sektorin, eitt nú planlegging og ráðgeving á lokalum/kommunalum and landsstigi, stýring og samskipan av sosialum arbeiði, vælferðartænastum og privatum verkætlanum. Eisini innan undirvísing, gransking og nýskapan. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Lokin útbúgving gevur atgongd til viðkomandi útbúgvingar á master stigi (second cycle programmes), men eisini – tó ofta treytað av eyka arbeiði – atgongd til ávísar aðrar masterútbúgvingar, sum ikki eru samfelagsvísindaligar. Í hvørjum einstøkum føri er neyðugt at kanna upptøkutreytirnar hjá universitetinum nærri. |

| D | ÚTBÚGVINGARHÁTTUR | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Trupulleika-grundað (PBL) verkætlanararbeiði, sjálvlestur, lesibólkar, fyrilestrar, stovnsvitjanir, seminar og verkstovur. Dentur verður lagdur á at hava lesandi, ið eru virknir luttakarar í kjakbólkum, framløgum og øðrum formum fyri samvirknari læring. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Hvør eind (við ECTS skeiðslýsing) endar við próvtøku. Metingarhættir: Skrivligar próvtøkur, skrivligar próvtøkur við munnliga próvhoyring/framløgu, munnligar próvtøkur (einsæris og í bólki), verkætlanir, v.m. Bachelorverkætlanin skal verjast munnliga. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Akademiskt arbeiðslag**: Arbeiða kannandi og fyrihalda seg kritisk greinandi til fakligar spurningar. Eginleikar til sjálvstøðuga og kritiska støðutakan, herundir eisini at duga at orða, lýsa, tulka/viðgera og greina/problematisera fakligar spurdómar og at seta fram niðurstøður og perspektivering<br><br>Skilja vísindalig ástøði, háttaløg og arbeiðshættir, ið eyðkenna fakøkini. Sjálvstøðuga og kritiska støðutakan til samfelagsvísindalig viðurskifti.<br><br>**Málsligir førleikar**: Orða seg neyvt og nágreiniliga, bæði ástøðiliga/greinandi og frágreiðandi, bæði munnliga og skrivliga. Skriva og tosa í hóskandi samsvari við samskiftisstøðuna.<br><br>**Sjálvstøðugt arbeiðslag**: Arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í toymum við atliti til evnis- og tíðaravmarking. Førleika til at staðfesta og loysa trupulleikar. At menna og dagføra egna læring.<br><br>**Vitan í praksis:** Førleiki at nýta samfelagsvísindaliga vitan í verki. |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | Dugir at brúka viðkomandi ástøðiliga vitan um tað fjølbroytni av viðurskiftum, sum ávirka sosial- og planleggingarsektorin í einum modernaðum samfelagi: gott innlit í viðkomandi kjarnutekstum úr fakligum bókmentum. Dugir at skilja týdningin av samspælinum millum ymsu fakøkini – t.d. sosiologi, antropologi og stjórnmálafrøði. |

| | |
|---|---|
| | Dugir at knýta hesa ástøðiligu fakligu vitan til vitan um praktisk og ítøkilig samfelagslig viðurskifti: mentanarligar, búskaparligar, tøkniligar og politiskar skipanir og prosessir, sum ávirka og samvirka við sosial og planleggingar viðurskifti.<br><br>Dugir at brúka sína vitan um týðandi vísindalig háttaløg og amboð við tí fyri eygað at loysa uppgávur innan sosial- og plansektorin í samfelagnum. Hetta umfatar: (a) Innlit í kvalitativ og kvantitativ háttaløg innan planlegging og sosialar greiningar; og (b) innlit í praktisk arbeiðsamboð, sum nýtt verða innan planlegging og sosialar greiningar.<br><br>Førleikar til at (á tvørvísindaligum og trupulleika-rættaðum grundarlagi) viðgerða og greina týðandi tættir og trupulleikar innan planleggingar- og sosialavísindi. Hetta umfatar: (a) sjálvstøðuga problematisering, viðgerð og greining; og (b) sjálvstøðuga og kritiska støðutakan til ástøði, háttaløg og arbeiðshættir, sum eyðkenna sosialvísindi og samfelagsplanlegging. |

| F | **FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNUM FRÁ ÚTBÚGVINGINI** |
|---|---|
| | Eftir lokna útbúgving skal tann lesandi vera før/ur fyri at<br>• Greiða frá og brúka sína vitan um týðandi ástøði innan sosialvísindi.<br>• Greiða frá og brúka sína vitan um søguligu menningina av vælferðarsamfeløgum og sosiala sektorin.<br>• Greiða frá og brúka sína vitan um háttaløg innan gransking av vælferðarsamfeløgum og sosialum viðurskiftum.<br>• Skipa, diskutera og miðla vitan um sosialvísindalig viðurskifti.<br><br>• Greiða frá týðandi ástøðiinnan planleggingarvísindi (statur, marknaður, sivilsamfelag).<br>• Greiða frá søguligu menningini av planlegging sum fakøki.<br>• Greiða frá háttaløgum í planleggingargransking.<br>• Skipa, diskutera og miðla vitan um planleggingarviðurskifti.<br><br>• Seta seg inn íog fyrihalda seg kritiskt til, hvussu samfelagsins sosial- og plansektorar samvirka við institusjonellar og organisatoriskar formar, teirra funksjónir, virkishátt og broytingar.<br>• Brúka ymisk arbeiðs- og greiningaramboð innan sosial- og plansektorarnar í samfelagnum.<br>• Greiða frá løgfrøðiligum hugtøkum, sum nýttir vera innan samfelagsins sosial- og plansektorar.<br>• Brúka útvald reiðskapsfak, herundir skilja teirra funksjón og leiklut innan sosial- og planleggingar sektorin.<br><br>• Grundgeva sjálvstøðugt og nágreiniliga fyri einum problematikki og trupulleikaorðing.<br>• Grundgeva fyri vali av ástøði og háttalag í eini verkætlan, umframt at seta fram eina greiða ætlan fyri gjøgnumføring og design av verkætlan.<br>• Duga sjálvstøðuga datainnsavnan og at nýta ástøðiliga/háttalags vitan í praktiskari nýtslu innan sosial- og plansektorin.<br>• Brúka útvald hugtøk, ástøði og háttaløg til at arbeiða við egnari verkætlan, t.v.s. at prógva sín førleika til at taka kvalifiseraðar og kritiskar avgerðir viðvíkjandi ástøði og háttalag í mun til trupulleikaorðing.<br>• Skipa eitt egið arbeiði og tess úrslit í eini samanhangandi og væl skipaðari verkætlanarfrágreiðing, og frá hesum grundarlagi at draga fram viðkomandi og grundaðar niðurstøður og perspektiveringar. |